Fjarskiftiseftirlitið

*15. mai 2024*

**<u>Vegleiðing um, loyvi til at stovna, reka og bjóða fylgisveina fjarskiftistænastur út í Føroyum</u>**

Loyvi til at stovna, reka og bjóða fylgisveina fjarskiftistænastur út í Føroyum, eitt nú frá Starlink, er regulera í *løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022*, Fjarskiftislógin.

Sambært § 4 í Fjarskiftislógini, skulu allir vinnuligir veitarar hava loyvi til, at stovna, reka og bjóða út alment fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastur. Fjarskiftiseftirlitið umsitur og veitir loyvi.

Flest øll viðurskifti, sum áður vóru ásett í konsessiónum, eru nú ásett í Fjarskiftislógini.

Tað eru bert vinnuligir veitarar, sambært § 3, stk. 1 nr. 9, ið hava loyvi til at stovna, reka og bjóða út fjarskiftiskervi og til at bjóða út fjarskiftistænastur, íroknað fylgisveina fjarskiftistænastur.

Aðrir veitarar, sambært § 3, stk. 1 nr. 8, enn vinnuligir veitarar, eru annars fevndir av lógini í tann mun, lógin er galdandi fyri veitarar generelt. Hetta merkir, at veitarar, ið bert veita fjarskiftistænastur, sum ein avmarkaðan part av virkseminum, eitt nú eigarafeløg, gistingarhús og kaffistovur, ikki skulu søkja um loyvi.

Sambært § 4, stk. 2, kann loyvi bert veitast kapitalfeløgum, undir hesum deildir hjá útlendskum kapitalfeløgum, skrásett hjá Skráseting Føroya.

Sambært 4, stk. 3, eru loyvir ikki eksklusiv, og kann vera givið fleiri vinnuligum veitarum loyvir at bjóða út somu tænastu.

Ásett er í § 4, stk 4, at loyvt er ikki at fara undir virksemi sum vinnuligur veitari, fyrr enn loyvi er fingið til vega. Hetta er eisini galdandi fyri uppsettan sambært § 50 í Fjarskiftislógini.

Vinnuligir veitarar av almennum fjarskiftiskervi og tænastum í Føroyum skulu sostatt vera skrásettir í Føroyum. Hetta forðar tó ikki fyri, at eigarin kann vera heilt ella partvís útlendskur, ella, at eitt føroyskt felag, sum hevur útlendskan eigara, ger brúk av tøkni og tænastum o.a. frá móðurfelagnum.

**Niðurstøða**
Tað eru bert vinnuligir veitarar, við loyvi frá Fjarskiftiseftirlitinum, sambært § 4 í Fjarskiftislógini, ið kunnu bjóða út fylgisveina fjarskiftis tænastur í Føroyum.

Tað er einki sum forðar fyri, at útlendsk feløg selja útbúnað og tænastur til føroyskar vinnuligar veitarar, sum hava góðkenning sambært § 4.

Skálatrøð 20 - Box 73 - FO 110 Tórshavn - Faroe Islands
Tel +298 35 60 20 - vs@vs.fo - www.vs.fo